# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Har var eingin samansvørjing ella nakað tílíkt. Diana doyði í einari vanlukku. Gevið henni nú frið*

*The Guardian*

# Heimshøvini kunnu fløða 75 metrar

**Sjálvt tær daprastu útrokningarnar av veðurlagsbroytingunum røkka ikki, tí tað kann blíva uppaftur verri, sigur NASA-granskari**

Sambært teirri seinastu veðurlagsfrágreiðingini hjá ST skal altjóða samfelagið skarva 50 prosent av CO2-útlátinum innan 2050, um hitin á Jørðini ikki skal veksa meiri. Men nú sigur NASA-granskarin James Hansen, at tað er neyðugt við uppaftur størri skerjing.

Í einari nýggjari frágreiðing kemur James Hansen til ta niðurstøðu, at tað er neyðugt at halda CO2-mongdini í atmosferuni niðri á 350 ppm, um vit skulu gera okkum vónir um at varðveita Jørðina í núverandi líki. James Hansen var sjálvur við til at gera tað upprunaliga tilmælið, sum segði, at CO2-mongdin eigur at vera í mesta lagi 450 ppm, men nýggjar kanningar hava fingið hann at sanna, at tað verður neyðugt við størri skerjing.

Í staðin fyri at brúka ymsar framrokningar eftir ávísum ástøðiligum leisti hevur byggir James Hansen sínar nýggju metingar á søguligt tilfar, sum hann og átta aðrir granskarar hava kannað. Teirra meting er, at hesin kanningarhátturin gevur eitt neyvari úrslit.

**75 metrar**

NASA-granskararnir hava kannað royndir, sum eru tiknar á havbotninum, og sum vísa, at fyri 35 milliónum árum síðani var CO2-mongdin í atmosferuni 450 ppm.

- Hava vit eina tílíka mongd nóg leingi, er tað sannlíkt, at allur ísurin fer at bráðna, og tað hevði havt við sær, at heimshøvini fara at fløða 75 metrar. Okkara kanningar vísa, at tað málið, sum altjóða samfelagið hevur sett sær, er ein vanlukka, sum vit kunnu vera vís í fer at koma, sigur James Hansen við bretska blaðið The Guardian.

James Hansen hevur leingi verið ein av teimum fremstu vísindamonnunum innan veðurlagsgransking, og sambært The Guardian var hann ein av teimum fyrstu, sum reistu spurningin um tann veksandi hitan á Jørðini og avleiðingarnar av tí.



*James Hansen var millum tey fyrstu vísindafólkini, sum vístu á vandan við tí veksandi hitanum á Jørðini*
*Mynd: Polfoto*

# Fogh góðar møguleikar at fáa leiðandi starv




*Anders Fogh Rasmussen verður kanska NATÐ-aðslskrivari, ES-forseti, formaður í Evropeiska Miðbankanum ella okkurt annað*
*Mynd: Polfoto*

**Danski forsætisráðharrin hevur eftir øllum at døma fleiri tilboð at velja ímillum ístaðin fyri forsætisráðharrastarvið**

Leingi hevur ljóðað, at Anders Fogh Rasmussen hevði góðar møguleikar at gerast tann fyrsti ES-forsetin, men nú ljóðar, at hetta er bara eitt av fleiri áhugaverdum størvum, sum hann kann fáa uttan fyri Danmark.

Næsta ár skal NATO hava nýggjan aðalskrivara, og sambært keldum hjá Børsen hevur danski forsætisráðharrin líka góðar møguleikar sum nakar annar at fáa tað embætið. Ja, keldur í Bruxelles siga fyri blaðnum, at Anders Fogh Rasmussen er tann, sum hevur teir bestu møguleikarnar á NATO-høvuðsborgini.

Eitt annað áhugavert starv uttan fyri Danmarker starvið sum formaður í ES-nevndini. Tað skal setast næsta ár. Um somu tíð skal Evropeiski Miðbankin hava nýggjan formann, og verður nýggja ES-lógin samtykt og sett í gildi, skal samveldið ein ráðsformann og ein uttanríkispolitiskan samskipara.

Keldurnar hjá Børsen vil vera við, at Anders Fogh Rasmussen verður hildin at vera egnaður til øll størvini. Sjálvur hevur hann einki sagt. Heldur ikki, nær hann ætlar sær frá, sjálvt um eftirmaðurin Lars Løkke Rasmussen er fluttur upp á næstovasta trin at bíða.

## STUTT SAGT

### Ísland og Jemen samstarva

Íslendskir ráðharrar ferðast víða um heimin. Nú um dagarnar hevur Össur Skarphéðinsson, ídnaðarráðharri, verið á vitjan í Jemen, har hann hitti Ali Mojawar, forsætisráðharra. Sambært íslendsku bløðunum tingaðust teir báðir um møguligt samstarv innan orku og serliga jarðhita, fiskivinnu og jarðskjálvtarannsóknir. Men íslendski ráðharrin hevði eisini onnur ørindi í Jemen. Ísland hevur biðið um pláss í trygdarráðnum hjá ST og roynir at fáa undirtøku fyri umsóknini. Ta áheitanina fekk Jemen eisini.

### Funnu sólskipan

Stjørnufrøðingar hava funnið eina sólskipan, sum líkist nógv okkara skipan, og tað hevur fingið stjørnufrøðingarnar at halda, at tað finnast helst fleiri slíkar sólskipanir úti í rúmdini. Sólskipanin, sum stjørnufrøðingarnir hava funnið, er umleið 5.000 ljósár frá Jørðini. Ein av frøðingunum, Martin Dominik, sigur við BBC, at teir hava funnið tvær gongustjørnur, sum eru sera líkar Jupiter og Saturn, og hann heldur tað als ikki vera óhugsandi, at sólskipanin eisini hevur eina gongustjørnu, sum líkist Jørðini.

Stjørnufrøðingar vita um umleið 300 sólir, sum líkjast okkara sól, men hetta er fyrstu ferð, at teir hava funnið eina sólskipan, sum líkist okkara. Martin Dominik sigur, at bara 10 prosent av teimum sólunum, sum vísindin veit um, hava meiri enn eina gongustjørnu í sínari skipan.

Stjørnufrøðingurin sigur við BBC, at nútímans og komandi tøkni fer at gera tað lættari at finna og rannsaka gongustjørnur, sum líkjast Jørðini.

